

# Sethús við handilshøli í Saltangará til sølu

Um hóskandi boð fæst verður ognin matr.nr. 206, Heiðavegur 66, 600 Saltangará lýst til sølu.

Kjallarahædd: handilshøli, skrivstova, køkur, goymslurúm, wc, og gangur, uml. 140m2.
Goymslurúm og fýrrúm undir jørð.
Miðhædd: Durur, gangur, goymslurúm, stórur køkur, stór stova, tvey baðiverilsir, tvey kømur, hjúnarúm og hjallur, uml. 208 m2.
Loft: Tvey kømur og stova, uml. 80 m2.
Bilhús, stór altan.
Grundøkið er 716m2.
Húsini standa sera væl fyri við høvuðsveg við góðum parkeringsmøguleikum.

Áhugað kunnu venda sær til Advokatskrivstovuna, Frúutrøð 4 Tórshavn, Fríða Patursson, adv. frp@jura.fo ella skrivaran Anniku Reginsdóttir Olsen aro@jura.fo

# Starvslýsing eftir námsfrøðingum til Dagstovnin við Stórá

**Søkt verður eftir námsfrøðingum til Dagstovnin við Stórá at byrja 15 aug 2011. Námsfrøðingar sum verða útbúðnir í jan/februar, kunnu eisini søkja.**

Dagstovnurin liggur í Rituvík og er stovnur undir Runavíkar kommunu. Stovnurin er normeraður til 70 børn í aldrinum 5 – 7 ár. Umleið helvt um helvt barnagarðsbørn og frítíðarskúlabørn.

- Starv á stovu við frítíðarskúlabørnum úr fyrsta flokki. Starvið inniber at vera stuðul hjá barnið við ADHD. Starvið er 20 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er ímillum kl 12.00 – 17.00. Starvið er tíðaravmarkað frá 15.08.2011 til 06.07.12
- Starv á stovu við frítíðarskúlabørnum. Starvið er sett til 25 t um vikuna og er arbeiðstíðin ímillum kl 12.00 – 17.00
- Starv á barnagarðstovu. Starvið er farloyvisstarv og er tíðaravmarkað frá 15.08.11 – 16.07.12. Starvið er 30 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er skiftandi ímillum kl 07.30 – 17.00
- Starv á barnagarðstovu. Starvið er farloyvisstarv og er tíðaravmarkað frá 15.08.11 – 16.07.12. Starvið er 30 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er skiftandi ímillum kl 07.30 – 17.00
- Starv á barnagarðstovu (Skákinum). Starvið er 30 tímar um vikuna og arbeiðstíðin er skiftandi ímillum kl 07.30 – 17.00

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Er áhugaður at arbeiða við børnum í aldrinum 5 – 7 ár
- Er íðin, nærlagdur og álítandi
- Hevur góð samstarvsevnir
- Hevur umsorgan og virðing fyri børnunum og vaksnum

**Setanarviðurskifti**
Størvini verða sett sambart sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya á lønarstigi 11-18

Um eingin námsfrøðingur søkir, verður hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum, skulu vera Runavíkar kommunu í hendi ,innan mikudagin 01 juni Runavíkar kommuna. Heiðavegur 26. 600 Saltangará

Nærri fæst at vita um størvini, við at venda sær til Jørgin Olsen leiðara tlf 216630

NOTA
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

# Bókhaldari

Fyri ein av kundum okkara, eitt virki í Klaksvík, søkja vit eftir einum bókhaldara.

Arbeiðið umfatar alt vanligt bókhalds- og roknskaparabeiði, umframt aðrar fyrisitingarligar uppgávur, sum eru tengdar at bókhaldinum.

Tann, ið setast skal í starvið, má hava góðan kunnleika til bókhald og roknskap, og vera førur fyri sjálvstøðugt at leiða arbeiðið. Praktiskar royndir frá vinnulívinum eru tí ein treyt.

Virkið førir bókhaldið á Lundin Financials, meðan aðrar loysnir frá NEMA verða nýttar til goymslu, fakturering og løn.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

Starvið skal setast skjótast gjørligt.
Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til **NOTA** (Jóanes Olsen).

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og skulu verða okkum í hendi **seinast 29. mai 2011.**
Umsóknir kunnu sendast við e-mail til jo@nota.fo.

NOTA
løggilt grannskoðanarvirki p/f

Hoyvíksvegur 5 · Postboks 30 · FO-110 Tórshavn · nota@nota.fo

FØROYA HANDILSSKÚLI

# Lærara í forritan og tøkni
## til teldustøðingaútbúgvingina



Um teldustøðingaútbúgvingina
Teldustøðingaútbúgvingin er styttri framhaldsútbúgving, ið tekur 2½ ár. Útbúgvingin fevnir í høvuðsheitum um systemmenning, forritan, tøkni og virki. Kjarnuøkini eru systemmenning og forritan; tøkni og virki eru ætlað at stuðla undir kjarnuøkini. Umframt hetta eru seinast í útbúgvingini sergrein, praktikk og høvuðsuppgáva. Neyvari kunning um útbúgvingina er á heimasíðu skúlans: www.fh.fo.

**Arbeiðsuppgávur tínar eru m.a. at:**

- undirvísa í viðkomandi lærugreinum innan forritan og tøkni (eitt nú softwarearkitektur og distribueraðar skipanir)
- leggja til rættis undirvísingargongdir, verkætlanir og próvtøkur
- leggja til rættis fakliga innihaldið í útbúgvingini í samstarvi við undirvísarar á útbúgvingini og leiðslu skúlans
- luttaka í ráðlegging og verkætlanum á skúlanum

**Vit vænta, at tú:**

- hevur viðkomandi útbúgving á kandidatstigi ella aðra hægri útbúgving, ið gevur førleikar at undirvísa teldustøðingum
- hevur áhuga í undirvísing
- dugir væl at samstarva og samskifta
- vilt vera við til at menna útbúgvingina og skúlan
- dámar at taka við nýggjum avbjóðingum

Tað er fyrimunur, men ikki ein treyt, at umsøkjarin hevur royndir við líknandi undirvísing.

Lesandi, sum eru um at vera liðug við útbúgving sína, eru eisini vælkomin at søkja.

**Vit kunnu m.a. bjóða:**

- eitt fakliga mennandi undirvísingarumhvørvi
- eftirútbúgvingarmøguleikar
- góðar arbeiðsumstøður
- ein spennandi og gevandi gerandisdag

**Setanartreytir:**
Starvið er tíðaravmarkað og verður sett eitt ár í senn. Talan er um parttíðarstarv, setanarbrøkur verður avtalað við tann ella tey, sum sett verða. Starvsstaður er Handilsskúlin í Tórshavn. Lærarar á teldustøðingaútbúgvingini verða løntir sambært galdandi sáttmála.

Starvið verður sett skjótast til ber og í seinasta lagi 1. august 2011, um ikki onnur avtalað verður gjørd.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avritum av viðkomandi skjølum vera at senda Føroya Handilsskúla, Marknagilsvegi 77, Postsmogu 177, 110 Tórshavn. Umsóknir skulu vera skúlanum í hendi í seinasta lagi 14. juni 2011.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Ainu L. Knudsen á telduposti alk@hsh.fo.

**FØROYA HANDILSSKÚLI**

Marknagilsvegur 77
Postsmoga 177
110 Tórshavn
Tlf 317177
Fax 313374
www.fh.fo

*Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli*

J. H. Schrøtersgøta 1 · FO-100 Tórshavn · Tlf. 302472
kvoldskulin@torshavn.fo · www.kvoldskulin.fo

# Skeið í máling og Málningalist

**Í tíðarskeiðinum 28.mai til 5. juni skipar Tórshavnar Kvøld- Ungdóms- og Listaskúli fyri 3 summarskeiðum í máling og málningalist við evninum : "Fuglar í flokki"**

**Skeið 1: Grundskeið 28.- 29.mai fyri byrjarar**
**12 tímar:** Leygardag, og sunnudag kl. 9.00 – 14.30
**Prísur:** 600 kr.

**Skeið 2: 30. -31.mai og 1.-2. Juni fyri fólk við nógvum royndum**
**24 tímar:** gerandisdagar kl. 16.15 – 22.00. Leygardag og sunnudag kl. 9.00 -14.30
**Prísur:** 1200 kr.

**Skeið 3: 3. - 4. og 5. Juni fyri fólk við nakað av royndum**
**18 tímar:** gerandisdagar kl. 16.15 -22.00. Leygardag og sunnudag kl. 9.00- 14.30
**Prísur:** 900 kr.

**Lærari:** Birger Møller, listamálari og rithøvundur. Umframt at hava skriva eina røð av bókum um evnið, undirvísir Birger á Århus Kunstakademi. Hann hevur hildið fleiri skeið á Kvøldskúlanum áður.

Tilmelding og nærri kunning um skeiðini hjá Randi Gunnarsdóttir á tlf. 266575 aftaná kl. 17.00 ella teldupost randimg@post.olivant.fo